

## Samgongan revsar pensjónistar

Meginfelag teirra brekaðu, MBF, átalar samgonguna og heldur, at tað er ósømiligt at leypa á, har garðurin er lægstur. Fyri at spara á fíggjarlógini er lógin broytt, soleiðis at pensjónirnar næsta ár ikki hækka fýra prosent sum ætlað, men trý prosent, og tað hevur samgongumeirilutin í Løgtinginum samtykt. MBF hevur í hesum sambandi enn einaferð víst Løgtinginum á, at støðan hjá fyritíðarpensiónistum er sera trong. - Tí sømir tað seg als ikki hjá landsins myndugleika at leypa á, har garðurin er lægstur og at skerja henda bólkin, sigur felagið.

# Parkeringsgjaldið hækka tveir triðingar

**Ein príshækking upp á 67 prosent. Tað er kostnaðurin av at alment partafelag yvirtekur virksemið frá privatum. Tann 1. oktober í ár skrúvaði P/F Vága Floghavn av álvara upp fyri prísinum á langtíðarparkering við floghavnina**

PRÍSHÆKKING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Áðrenn P/F Vága Floghavn yvirtók langtíðarparkeringina við Vága Floghavn, stóð Vága Vaktarhald fyri skipaðu langtíðarparkeringini. Tá var prísurin á langtíðarparkering 30 krónur um døgnið teir fyrstu fimm dagarnar. Men síðan tá hevur P/F Vága Floghavn yvirtikið virksemið, og fyrst í oktober í ár hækkaðu teir prísin við 67 prosentum, frá 30 krónum til 50 krónur um døgnið teir fyrstu fimm dagarnar.

Dávid Reinert Hansen, forstjóri í P/F Vága Floghavn, heldur tó ikki at henda hækkingin er ov mikið.

- Prísurin hevur ikki verðið justeraður í longri tíð. Tí valdu vit at hækka prísin eitt sindur. Sjálvt um tað er næstan ein fordobling av prísinum, so er tað enn ein relativt lágur prísur, um tú hugsar um hvat tað kostar at parkera við aðrar floghavnir, eitt nú í Kastrup, kann tykjast at vera eitt ógvusligt inntriv. Men sambært forstjóranum, Dávid Reinert Hansen, er hesin sigur Dávid Reinert Hansen, forstjóri.

### Fortreyt fyri tænastuna

At prísurin verður hækkaður við 67 prosentum í einum, kann tykjast at vera eitt ógvusligt inntriv. Men sambært forstjóranum, Dávid Reinert Hansen, er hesin prísurin ein fortreyt fyri at kunna bjóða sínum viðskiftafólkum eina tænastu.

- Tað hevur nakrar útreiðslur við sær at hava skipaða parkering við flogvøllin. Fyri at kunna veita okkara viðskiftafólkum eina góða tænastu, er tað neyðugt at hetta verður fíggjað, vísir Dávid Reinert Hansen á.

Er tað fyri at skapa inntøkur til Vága Floghavn at virksemið er yvirtikið og prísirnir hækkaðir?

- Tað er ein partur av tí. Men vit síggja at tað er brúk fyri at gera nakrar broytingar viðvíkjandi ferðsluni við floghavnina. Millum annað skulu vit gera omankoyringina til floghavnina øðrvísi og skipa ferðsluna betri kring dyrnar til floghavnina. Skulu vit kunna taka ímóti øllum bilunum, sum koma til floghavnina, so verða vit noydd at gera ymiskar broytingar. Í fyrstu syftu verða onkrar broytingar við at ferðslan verður umløgd, og upp á sikt verða tað eisini fleiri parkeringspláss, greiðir forstjórin frá.



*Príshækkingin á 67 prosent førir við sær, at fólk nú heldur velja at seta bilin aðrastaðni, og at parkeringsøkið til langtíðarparkering stendur so at siga tómt*

*Savnsmynd*

### Prísurin ikki avvísandi

Síðan kostnaðurin á langtíðarparkering varð hækkaður, hava alsamt fleiri valt at seta bilin á básarnar, ið eru ætlaðir til styttri steðgir, upp til tveir tímar. Hetta er við at gerast ein trupulleiki, men eftir øllum at døma ein trupulleiki, ið skjótt verður loystur.

- Vit hava upplivað at fólk nú parkera aðrastaðni ístaðin, eitt nú í umráðinum, har loyvt er at steðga í tveir tímar. Men frá fyrst í januar verður parkeringsavgjald lagt á har, soleiðs at bøtur verða útskrivaðar, verður parkeringsskivan ikki sett, sigur Dávid Reinert Hansen.

Samanumtikið heldur hann at gjaldið fyri parkering hóast hækkingina er øgiliga lágt í mun til tær útreiðslur, tú annars hevur av at fara uttanlands at ferðast, og skoytir uppí, at hann heldur ikki at prísurin virkar avvísandi á brúkaran.

Brúkari:

# Alt ov dýrt

**Av tí at tað er blivið dýrari at parkera við Vága Floghavn, metir Eyðun Húsgarð, vanligur brúkari, at tænastustøðið er versnað munandi.**
**– Fyrr plagdi eg at hava bilin standandi har hvørja ferð, eg fór uttanlands, men nú tað blivið nógv for dýrt, staðfestir Eyðun Húsgarð**

PRÍSHÆKKING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ein príshækking á 67 prosent fyri fyrstu fimm dagarnar av langtíðarparkeringini fer eftir øllum at døma ikki ómerkt framvið borðinum hjá vanliga brúkaranum. Fleiri brúkarar velja nú heldur at seta bilin aðrastaðni ella at biðja fólk koyra seg vestur.

Eyðun Húsgarð, stjóri á Prentmiðstøðini, er ein, ið vanliga valdi at brúka møguleikan fyri langtíðarparkering, men sum eftir at prísirnir eru hækkaðir, heldur velur eina aðra loysn.

- Fyri 10 dagar kostar tað mær nú umleið 500 krónur, og tað meti eg er nógv for dýrt, sigur Eyðun Húsgarð.

Tað er ikki bert sjálvur prísurin, ið er hækkaður, men hevur P/F Vága Floghavn eisini broytt. Áðrenn broytingina kostaði tað 60 krónur at seta bilin í langtíðarparkeringina, tá tú fórt av landinum eitt vikuskifti frá fríggjadag til sunnudag. Nú kostar tað 150 krónur fyri sama tíðarskeið. Orsøkin til ógvusligu hækkingina er tann, at nú verður fyrsti dagurin roknaður við, meðan tað áðrenn varð roknað fyri hvørt døgn, bilurin longu hevði staðið.

### Tænastan versnað

Áðrenn P/F Vága Floghavn yvirtók langtíðarparkeringina og hækkaði prísin, plagdi til tíðir at vera trupult at fáa pláss fyri bilinum, og vísti tað at stórur tørvur var á hesum møguleika.

- Áðrenn var tað ringt at fáa pláss, men nú er skrall tómt. Tað eru nógv fólk, sum lata vera við at parkera har nú, orsakað av prísinum, sigur Eyðun Húsgarð.

Vága Vaktarhald hevði, áðrenn P/F Vága Floghavn yvirtók langtíðarparkeringina, fingið hesa uppgávuna útlisiteraða frá Landsverk. Teir kundu eftir øllum at døma veita eina bíligari tænastu enn hana, ið er nú.

- Tá prísurin var lágur, var tað Vága Vaktarhald, sum rak parkeringina. Nú hevur Vága Floghavn yvirtikið tað, og tá fordoblast prísurin. Men hvat er broytt? Parkeringsplássið er enn líka stórt, og ongar íløgur eru gjørdar. Alt í alt haldi eg at tænastan er versnað munandi, og hevur hetta gjørt tað, at eg nú heldur fái onkran at koyra meg vestur á flogvøllin, heldur enn at taka bil við sjálvur, staðfestir Eyðun Húsgarð.